# Føroyar sum eitt valdømi

SJÓNARMIÐ
*Fríðfinnur Johnsson*
*Leirvík*



Tað leikar hart á í løtuni, málið um at gera Føroyar til eitt valdømi er ovast á dagskránni og hóttir við at forkoma samgonguni.

Eg eri millum teirra, sum leingi havi mælt til at gera Føroyar til eitt valdømi. Tað eru sjálvandi ymiskar meiningar um hetta, men mín fatan er, at tíðin er farin frá at býta Føroyar upp á henda hátt. Hetta uppbýtið byggir ikki á demokrati, tí tú sleppur ofta ikki at velja fólk, sum tú heldur umboða tína sannføring, tú verður noyddur at velja fólk, sum búgva í sama valdømi sum tú, óansæð um tey hava somu sannføring sum tú. Demokrati er at sleppa at velja fólk, sum hava somu polittisku sannføring sum tú, tað hevur ikki so nógv at týða, hvar hesi fólk búgva.

**Nøkur dømi sum lýsa hetta**
Eg búgvi í Leirvík, sum hevur Norðoyggjar til nærmastu grannar. Tað tekur einans 10 minuttir at koyra higani og til Klaksvíkar, men fólk higani sleppa ikki at velja valevni í Norðoyggjum og mótsatt, hóast Norðoyggjar nú liggja næst, og í nógvar mátar líkjast okkum, hetta forðar vallógin. Hví skal vallógin forða fólki at velja teir persónar, sum tey halda vera best skikkað at stýra landinum? Fyri mær er hetta ikki serliga demokratiskt.

Í einum sonnum fólkaræði er tað ikki avgerðandi, hvar ið tú býrt, men hvat, ið tú heldur, hvørja politiska sannføring tú hevur.

**Vallógin marginaliserar nógvar bólkar**
Hetta síggja vit týðiligast, um vit hyggja at kvinnuumboðanini. Hon er so lág, at tú skuldi trúð, at Føroyar eru eitt land, sum miðvíst diskriminaliserar konufólk. Tað haldi eg ikki er tilfeldið. Mín fatan er, at vallógin er høvuðsgrundin til lágu umboðanina av kvinnum. Um Føroyar verða eitt valdømi, so fara kvinnur at fáa eina betri umboðan, tað eri eg vísur í.

Men vallóging marginalserar eisini onnur. Til dømis er tað sera trupult at blíva valdur; um tú kemur úr einum av teimum smærru bygdunum, tí vallógin vísir seg at virka soleiðis, at fólk í eini bygd velja valevni úr síni bygd, tí hava valevni úr smærru bygdunum ilt við at blíva vald. Tey eru marginaliserað.

Eisini fólk, sum hava eina áskoðan, ið víkur eitt sindur frá tí vanliga, eru marginaliserað, tí um tey ikki eru nóg nógv í einum valdømi, so blíva tey ikki umboðað. Hetta ger, at Føroyar í mangar mátar eru sera konservativar. Fólk, sum hava áskoðanir, sum víkja eitt sindur frá tí vanliga, td. eru eitt sindur framman fyri sína tíð, blíva ikki vald, landið er býtt í so smá øki, at pláss er ikki fyri teimum.

Til tykkum, sum ganga inn fyri at Føroyar verða eitt valdømi.

Haldið fast við hetta sjónarmiðið, og fái broytt Føroyar frá at vera eitt land býtt upp í øki, sum einki hava við nútíðina at gera. Tey eru, out of time.

Til tykkum, sum eru í móti Føroyum sum einum valdømi. Verið ikki bangin, økini verða umboðað, tað er eingin ivi um tað. Einasti munurin verður, at tey, sum verða vald eftir nýggju vallógini, betur fara at umboða allar hugsanir, sum rørast í Føroyum. Føroyar gerast meira demokratiskar, og fjølbroyttar til gagns fyri okkum øll.

# Hans Pauli Strøm og píkar

PETUR HERMANSEN



Á portalinum ger heilsumálaráharrin vart við tað, at fólk skulu renna ella ganga aftan á motorsúkklum og bilum í Hovstunnilinum.

Harra Heilsumálaráharri, nú og 180 dagar fram, skulu túsund av Føringum ganga ella renna, súkkla, og herímillum børn á veg í skúla, eldri fólk sum ikki kunnu sita vard inni í einum bili noyast at anda allan lortin frá bilum við píkum - tað sum eitur flúgvistøv sera løgi, at ikki Hans Pauli Strøm heldur at hetta er vert at finnast at.

Fólk sum líða av astma og øðrum lungna- ella andadrátstrupulleikum, hava ongan livandi kjans at verða vard hetta hálva árið píkarnir eru loyvdir, longu nú eru hópin av píkum, og hetta í 12 hitastigum, eru fólk býtt, líkasæl ella bara óhugnaliga egoistisk, eg veit ikki, men kanska heilsumálaráharrin kann siga mær tað.

Til Hans Paula Strøm kann eg upplýsa, at ein bilur við 400 píkum loysir uml 80 til 100 gram av asfalti fyri hvøn kilometur bilurin koyrir, hetta skuldi sagt heilsumálaráarranum alt.

Kanska skal eg verða so bjartskygdur at vænta viðmerking frá heilsumáláráharranum.

# Farvæl til kommunurnar

ZAKARIAS WANG



Í orðaskiftinum um avtøkuna av uppstillingardømunum, sum nú er upp á tal, verður viðhvørt ført fram, at kommunurnar fara at hava eitt týdningarmikið lutverk í framtíðar Føroyum.

Hesum er tó eingin orsøk til at rokna við.

Okkurt skulu teir tingmenn gera, sum eru valdir í hesum nýggja uppstillingardømi. Teir fara væl at síggja, at tað eru nógvar dupultfunktiónir, sum slepst undan, um kommunurnar verða niðurlagdar. Hetta gevur meira vælferð fyri hvørja skattakrónu.

Tingið hevur loyvi til at samtykkja, at kommunurnar verða avtiknar, og nógv kann førast fram fyri hesum sjónarmiði. Eitt er tað, at aðrastaðni eru kommunur sjáldan so smáar sum allar Føroyar. Fara vit til næsta grannaland okkara, Hetland, so er tað alt ein kommuna. Í Danmørk hava teir júst lagt amtini saman í nýggjar stórar kommunur.

Alt bendir tí á, at sleppa vit uppstillingardømunum, fara vit eisini at siga farvæl til føroysku kommunurnar.

# Suðuroyggin ein kommuna

HEÐIN D. POULSEN



Hovstunnilin er opnaður, og sum løgmaður segði, kann hann vera ein liður í at binda Suðuroynna tættari saman, men tað er ikki nokk; Suðuroyggin átti at verið løgd saman í eina kommunu við lóg.

Tíverri hevur tað víst seg, at kommunupolitikarar úr Suðuroynni mangan hava staðið spjaddir og harvið veikari í mun til restina av landinum. Tað er eingin ivi um, at ósemja millum lokalar politikarar og ikki íbúgvarnar, hevur forðað fyri framgongd í Suðuroy. Tí átti Suðuroyggin at verði løgd saman í eina kommunu sum skjótast.

Suðuroyggin hevði staðið seg nógv sterkari, bæði innanhýsis og mótvegis restini av Føroyum, hevði hon verið samlað í eina felags kommunu. Harafturat hevði umsitingin hjá felagskommununi kunna ment seg og eggja fólki við hægri útbúgving at flutt suður.

Nú Føroyar gerast eitt valdømi, er tað av alstórum týdningi, at Suðuroyggin gerst ein sterkari eind, og hetta verður ikki veruleiki, fyrr enn oyggin er ein kommuna.

Eitt annað er, at tað átti ikki at verið neyðugt, at heili sjey kommunustýrir skulu til, fyri at stýra teimum 4933 íbúgvunum, ið sambært Hagstovuni búði í Suðuroy 1. august í ár.

**Fólkaatkvøða fyri alla oynna**
Í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar, ið kom í gildi í februar í ár, verður givið landsstýrismanninum heimild at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging.

Hesa heimild eigur landsstýrismaðurin at nýta, og skipa fyri einari fólkaatkvøðu í øllum kommunum í Suðuroy. Verður meiriluti fyri einari kommunu millum íbúgvarnar í Suðuroynni, so eigur fólkaatkvøðan at verða fylgd og Suðuroyggin løgd saman í eina kommunu við lóg áðrenn næsta kommunuval.

# Jákup Reinert Hansen suverænur sum biskupsvalevni!

BERGUR JACOBSEN



**Í morgumsendingini hjá Rás2 í farnu viku sýndi sandsprestur seg sum ein sannan kirkjuleiðara**

Tað var ein frægd at hoyra Jákup Reinert Hansen í sendingini úr studionum hjá Rás2. Fyri ein og hvønn, sum hevur lagt seg eftir, hvat ið leiðsla er, og hvørji evnir ein leiðari skal hava, var tað heilt greitt at sandsprestur hevur tað í sær, sum krevst av næsta føroyska biskuppinum.

Sjálvandi finnst onki menniskja, ið hevur allar dygdirnar, ið væntst av einum góðum leiðara. Men, Jákup Reinert Hansen prógvaði á ein fyrimyndarligan hátt, at hann er so fakliga kvalifiseraður, sum nakar kann vera.

Hann er ikki bara ein væl lærdur guðfrøðingur, ið dugir at bera sín boðskap fram soleiðis at øll vita hvat hann sigur, uttan nøkur øøø, æææ ella ååå. Hann prógvaði eisini at hann betur enn nakar annar kennur kirkjuliga bygnaðin og kirkjuligu løggávuna, sum hann sjálvur hevur verið við til at smíða.

Hann dugdi at svara fólki aftur, var ikki sørur fyri humor, og sum tann ektaði persónurin hann er fór hann ikki at fáa sær nýggjar brillur ella hársnið fyri at verða valdur til biskup. Og tað var heilt greitt, at hann hevur hugsjónir kirkjuni viðvíkjandi, og at hann veit, hvat ið gongur fyri seg á kirkjuliga økinum kring okkum.

Samstundis so sýndi hann eina breidd í vitan og áhugum, sum prógva at tey 25 árini í Todnesi ikki bara hava verið 25 ár í eini fílabeinsborg, men at prestagarðurin heima á Sandi hevur verið karmurin um eitt stórt vísundaligt virksemi, og bæði Norðurlond, Evropa og allurin heimurin hava verið innan fyri sjónarringin í Todnesi.

Verður Phd. Jákup Reinert Hansen ikki valdur til biskup, so hevur føroyska kirkjan mist tann besta leiðaran vit eiga boð uppá júst nú.